Toll- og Skattstova Føroya

# Grannskoðari og málsviðgeri

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar Øki, eru 2 størv leys at søkja.

**Hesi størv umfata:**
1 fast starv sum grannskoðari til setan 1/9 2003 ella so skjótt sum til ber

1 avloysari sum málsviðgeri frá 1/9 2003 til 15/4 2004

**Høvuðsuppgávur - grannskoðari:**
Grannskoðan av virkisroknskapum við atliti til skatta- og MVG uppgerðir, umframt aðrar avgjaldslógir, sum stovnurin umsitur.

**Førleikakrøv**
Tann, sum settur verður, skal helst hava roknskaparligan førleika, sum t.d. HD, merconom í roknskapi ella grannskoðan, aðra líknandi útbúgving ella royndir í roknskapararbeiði.
Viðkomandi skal vera arbeiðssamur og fyrikomandi, og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Málsviðgeri:**
Viðgerð av MVG-uppgerðum, skrásetingum í vinnuskránni og ymiskt annað fyrifallandi.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar við HH-útbúgving, skrivstovuútbúgving ella royndum innan skrivstovuarbeiði hava fyrimun.
Viðkomandi skal vera arbeiðsamur og fyrikomandi, og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunnu bjóða**
- spennandi størv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini eru fakliga krevjandi
- klokkuskipan við flextíð
- sjálvstøðug størv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir**
Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Núverandi setanarøkið er Streymoyar Øki, men fevnir annars um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, og tann/tey, ið sett verða, skulu kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Viðkomandi, ið settur verður, skal vera fúsur at luttaka í teimum útbúgvingarmøguleikum, sum Toll- og Skattstovan bjóðar bæði á stovninum og uttan fyri stovnin eitt nú á handilsskúla v.m. og taka lut í teimum skeiðum, sum stovnurin fyriskipar.

Nærri frágreiðingar um størvini fáast við at venda sær til Hallbjørg Hansen, deildarleiðara, ella Eyðfinn Hansen, økisstjóra, tlf. 310260.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu verða Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar Øki, í hendi í seinasta lagi: **15. august 2003**

**Toll- og Skattstova Føroya**
Streymoyar øki
Postsmoga 3139
FO-110 Tórshavn

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum.

Uppgávur stovnsins eru m.a. at fyrisita
- skattalógina
- tolllógina
- mvg-lógina
- kolvetnisskattalógina
- avgjaldslógirnar,

eins og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økis-skrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Á Streymoyar Øki, Smyrilsvegi har viðkomandi kemur at starvast, eru 35 starvsfólk.

Lýsingin finst eisini á heimasíðu okkara: www.tollskatt.fo

E-mail: Streymoy@tollskatt.fo

Lesið Sosialurin -tað loysir seg


HOTEL VÁGAR *** THE AIRPORT HOTEL

Tann stóra føroyska buffetin

*- royn føroyskan mat og mentan hvørt leygarkvøld alt summarið*

**Vit bjóða eina føroyska buffet við meira enn 30 ymiskum heitum og køldum fiska- og kjøtrættum.**

**Chefkokkurin bjóðar m.a.:**



**Kalt**
*Turt lambstjógv*
*Turt tvøst*
*Saltað spik*
*Turran fisk*
*Seyðarhøvd*
*Saltað lambstjógv*
*Øður*
*Ymiskir fiska- og skeljadjóraserrættir*

**Heitt**
*Grindagrýta*
*Lambaryggur*
*Oksahàryggur*
*Dunnubringa*
*Reyðtunga*
*Kalvi*
*Laksur*
*Kongafiskur*
*Saltfiskur*

**Omaná**
*Surprice*

*fyri hvønn* ***180,-***



**Føroyskur dansur:**
*Uml. kl. 20.30 verður skipað fyri føroyskum dansi.*
*Eisini verður greitt frá um føroyska mentan.*

HOTEL VÁGAR

FLOGFELAG FØROYA · SØRVÁGUR · TEL 33 29 55 · FAX 33 23 10 · T-Postur: hotel@ff.fo


www.sosialurin.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2716, Sp/f El & Tele, 100 Tórshavn.
**Nýggj adressa:** Argjaboðagøta 7, FO-160 Argir.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Eyðun Egholm, Fjalsgøta 13, 100 Tórshavn.
**Innkomin í nevndina:** Turið Hentze Magnussen, Djúpagilsvegur 30, 188 Hoyvík
**Grannskoðari:**
**Farin frá sum grannskoðari:** Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Paturssonargøta 18, FO-100 Tórshavn.
**Innkomin sum grannskoðari:** Sp/f KPMG, statsaut. revisorar., Staravegur 17, FO-100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 9. juli 2003*

*Kristin Balle*

# Maskinmeistari

Søkt verður eftir maskinmeistara til nýggja virkið hjá P/F Salmon Proteins á Eiði.

**Arbeiðsuppgávur**
At hava ábyrgd fyri dagliga rakstrinum, sum í høvuðsheitum er at ansa eftir dampketli, trýstkókara, reinsiskipan, pumpum og hartil hoyrandi útbúnaði. Viðlíkahald av rakstrartólum.

**Førleikakrøv**
Maskinmeistaraútbúgving. Ketilpassaraprógv er ein fyrimunur. Kunnleika til telduskipanir, serliga skipanir til stýring av rakstrartólum.
Tað er umráðandi, at tann, ið settur verður, kann arbeiða sjálvstøðugt, og er førur fyri at leggja arbeiði til rættis sjálvur.

**Setanartreytir**
Løn og arbeiðstíð sambært avtalu.

**Umsókn**
Umsókn saman við upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera P/F Salmon Proteins, Postboks 9, 470 Eiði í hendi seinasta lagi 17. juli 2003.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jógvan Emil Nielsen á tlf. 423478 ella 210270.

P/F Salmon Proteins er eitt nýtt felag, ið skal savnað saman slógv frá alivinnuni í Føroyum og hagreiða hetta á nýggja virkinum á Eiði.



# Stuðlar til stuðulsfólkaskipanina fyri vaksin

Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin fevnir um alt landið og hevur til endamáls at veita sosialpedagogiska hjálp, fylgi, eftiransan og umsorgan. Harumframt eru røktaruppgávur, sum eru skipaðar í samstarvi við Heimarøktina.

Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin ynskir stuðlar, ið m.a.:
- kunnu arbeiða sjálvstøðugt og einsamøll í heimi brúkarans og samstundis eisini kunnu átaka sær at arbeiða í einum øki, har tað ræður um intuitión
- vísa áhuga og virðing og samstundis vera professionellir
- eru stuðlandi og hjálpa brúkaranum uttan at taka ábyrgdina fyri lívinum frá honum
- eru sterkir – bæði til sálar og likam
- kunnu handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, ið einki kann sigast um frammanundan

Søkt verður eftir stuðul til:

**Eysturoy:**
Genta 18 ár, ið situr í koyrstóli.
Arbeiðstíðin er 25 tímar um vikuna.
Koyrikort krevst.

**Tórshavn:**
Genta 20 ár, rørslu- og menningartarnað.
Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna.

Størvini verða sett 1. august 2003 ella skjótast aftaná.

**Lønar- og setanartreytir:**
Talan er um størv innan Heimarøktina og Serforsorgina og roknast má við, at arbeiðstíðirnar av og á eru skiftandi, dag-, kvøld- og vikuskiftisarbeiði.
Løn sambært viðkomandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er sett til 25. juli 2003 og umsóknir skulu sendast til:

**Stuðulsfólkaskipanina fyri vaksin**
att: Regin Johansen
Eirargarður 2, 2. hædd, 100 Tórshavn

# Vinnarar av stuðulssvimjingini hjá Svimjisambandi Føroya 2003

**Drigið er millum stuðlarnar, ið hava stuðlað til stuðulssvimjingina hjá Svimjisambandi Føroya, og eru vinnararnir hesir:**

| Vinningar nr.: | Vinnarar: |
| --- | --- |
| 1. GSM Nokia 3410 við teletíðarhaldi | Hr. Eyðalvur Bech, 950 Porkeri |
| 2. GSM Nokia 3410 við teletíðarhaldi | Hr. Steinbjørn Jacobsen, Undir Heynum 4, Tórshavn |
| 3. Vikuskiftisferð ti lDanmarkar fyri 1 | Fr. Margit Petersen, Søljubrekka, 620 Runavík |
| 4. 500 litrar av olju frá Føroya Shell | Fr. Tóra Eyðunsson, 650 Toftir |
| 5. 500 litrar av olju frá Statoil | Hr. Leivur Thorsteinsson, Helnabrekka 17, 700 Klaksvík |
| 6. Gávukort á 500 kr. frá F.K. | Hr. Edmund Hansen, 270 Nólsoy |
| 7. Gávukort á 500 kr. frá Samkeyp | Vouge, Postboks 330, 110 Tórshavn |
| 8. Gávukort á 500 kr. frá Elding | Hr. Bennie Højgaard, Norðuri í Gerði 13, 530 Fuglafjørður |
| 9. Gávukort á 500 kr. | Hr. Niels Juul Olsen, Fútalág 45, 100 Tórshavn |
| 10. Gávukort á 500 kr. | Fr. Nina Petersen, Undir Nesinum, 650 Toftir |

Vinningarnir vera latnir vinnarunum mótvegis kvittan fyri at hava goldið stuðulin.
Kvittanin skal sendast til Svimjisamband Føroya, Postboks 1329, FO-110 Tórshavn.

Svimjisamband Føroya takkar øllum, sum hava stuðlað Føroyskari svimjing.

**Svimjisamband Føroya**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3632
**Navn:** Sp/f JN
**Adressa:** Millum Gilja 157A, FO-188 Hoyvík
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 01.07.2003
**Viðtøkudato:** 01.07.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnarar:** Jákup A. Nielsen, Millum Gilja 157A, FO-188 Hoyvík og Andrias Johannesen, Fagralíð 3, FO-100 Tórshavn.
**Stjórn:**. Andrias Johannesen, Fagralíð 3, FO-100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
**Grannskoðari:** Sp/f Revisión v/Kaj Joensen, skrás. grannsk., Stoffalág 4, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 01.07.2003 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka keyp, søla, fiskivinnu og annað starv í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 9. juli 2003*

*Kristin Balle*


Ólavsøkublaðið 2003



Blaðið verður borið í hvørt hús í Føroyum vikuna undan Ólavsøku!

Virkir, handlar og onnur, ið ynskja at lýsa í blaðnum, verða vinarliga biðin at siga frá í seinasta lagi Týsdagin 12. juli.

Telefon: 34 18 00 og spyr eftir Finnbjørg ella Duritu

Teldupostur: durita@sosialurin.fo finnbjorg@sosialurin.fo



Sosialurin ..tí góð bløð hanga ikki á trøunum



COMPAQ Local Service Partner
hp invent
Teknisk ráðgeving
Netinstallatiónir
Tráðleysar netskipanir
Autoriserað verkstað
Tænastusáttmálar
www.com-data.fo
COM-DATA
Klaksvík tlf. 456100 Saltangará tlf. 449840



Tíðindi Bilar Lýsingar Viðmerkingar



Sosialurin -tað loysir seg



**Summarfrí**

Bilverkstaðið er stongt frá 21. juli til 20. august.

SUZUKI
Spf. Eyðbjørn Hansen
Varðagøtu 75, Tórshavn
Tlf. 313375